# Enn eitt seismikk-felag á vitjan

Jan Muller

Nú tað nærkast fyrsta útbjóðingarumfarinum á føroyskum øki er áhugin fyri at gera enn meira av seismiskum kanningum stórur. Ein kann siga, at tað, sum higartil er gjørt av seismikki við Føroyar, er bert ein dropi í havinum at sammeta við tær kanningar, sum standa fyri framman. Ein kann siga, at kanningarnar, sum gjørdar eru higartil, eru sjálvt grundarlagið. Nú verður so farið meira nágreiniliga og detailierað til verka eitt nú við meira avanseraðum seismikki so sum 3 og 4 D. Nú ræður um at fínkemma eitt ávíst øki og finna rætta staðið at seta borin í. Hevur tú ikki gjørt títt heimaarbeiði nóg væl og gjølla, so tú rakar bara nakrar metrar við síðuna av „kelduni", so hava 100-150 mill. kr. verið til onga nyttu. Hetta er tað, sum tað kostar at bora eitt hol við Føroyar.

At forða fyri, at hetta hendir, er nettup uppgávan hjá seismikkfeløgunum, og eitt nú hjá PGS, sum stendur fyri „Petroleum Geo-Services A.S.".

PGS hevur loyvi at skjóta seismikk á føroyskum øki. Herfyri vóru trý umboð fyri felagið í Bretlandi á vitjan í Føroyum. Millum teirra var David Griffith, sum er sølustjóri hjá felagnum.

Hann er ikki hugaður at úttala seg í løtuni, men vil venda aftur til tað tíðliga í 97, tá PGS helst hevur gjørt sær eina ætlan um, hvussu farast skal fram á føroyskum øki í 97.

Eftir tí Sosialurin skilir, so hevur fyritøkan staðið fyri rættiliga stórum parti av seismikkinum í Hvítu sonuni, tvs. ongamannalandi millum Føroyar og Bretland.

Hetta økið sær sera áhugavert út og nú er so ætlanin at føra seismisku linjurnar víðari vestureftir inn á føroyskt øki. Tvs. at nú seismisku feløgini hava stóran kunnleika til undirgrundina bæði á bretskum øki og í Hvíta økinum er heilt náttúrligt at halda fram vestureftir. Hildið verður, at føgini halda fram inni á føroyskum øki og tí kann vitanin frá hinum báðum økjunum koma væl við í kanningunum á føroyska landgrunninum.

**Nógv seismiskt virksemi**

Fólk í oljuheiminum vilja vera við, at 97 og kanska serstakliga 98 verður tað heilt stóra seismiska árið á føroyskum øki. Roknað verður við, at eini 5 seismikkfeløg fara at arbeiða á føroyska landgrunninum hesi bæði árini við millum 5 og 10 skipum.


Teldu skúlin

**Skeiðætlan 1. hálvár 1997**

| | Januar | Februar | Mars | Apríl | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | | | | | 1 |
| 2 | | | | Windows '95 | 2 |
| 3 | | Access 7.0 | Concorde C5 Lager | Word 6.0 | 3 |
| 4 | | grundskeið | Word 7.0 | grundskeið | 4 |
| 5 | | Word 7.0 | víðkað skeið | | 5 |
| 6 | Concorde C5 Light | grundskeið | Windows '95 | | 6 |
| 7 | Word 7.0 | Schedule/Mail 7.0 | | Access 7.0 | 7 |
| 8 | grundskeið | | | víðkað skeið | 8 |
| 9 | Excel 7.0 | | | Excel 7.0 | 9 |
| 10 | grundskeið | Windows '95 | PowerPoint 7.0 | víðkað skeið | 10 |
| 11 | | Concorde C5 | grundskeið | Windows 3.11 | 11 |
| 12 | | Finans | Windows 3.11 | | 12 |
| 13 | Windows '95 | Excel 7.0 | Excel 5.0 | | 13 |
| 14 | PowerPoint 7.0 | grundskeið | víðkað skeið | Concorde C5 | 14 |
| 15 | grundskeið | | | Finans | 15 |
| 16 | Windows 3.11 | | | Excel 7.0 | 16 |
| 17 | | Word 7.0 | Concorde C5 Light | grundskeið | 17 |
| 18 | | grundskeið | Excel 7.0 | Schedule/Mail 7.0 | 18 |
| 19 | | Windows 3.11 | víðkað skeið | | 19 |
| 20 | Word 7.0 | Excel 5.0 | | | 20 |
| 21 | víðkað skeið | grundskeið | Schedule/Mail | Concorde XAL | 21 |
| 22 | Excel 5.0 | | | Windows '95 | 22 |
| 23 | víðkað skeið | | | Word 7.0 | 23 |
| 24 | Concorde XAL | Word 6.0 | Excel 7.0 | grundskeið | 24 |
| 25 | | víðkað skeið | grundskeið | | 25 |
| 26 | | Concorde XAL | Windows '95 | | 26 |
| 27 | Windows '95 | Excel 7.0 | | | 27 |
| 28 | Concorde C5 | grundskeið | | Excel 5.0 | 28 |
| 29 | Finans/Debet/Kredit | | | grundskeið | 29 |
| 30 | Word 6.0 | | | | 30 |
| 31 | grundskeið | | | | 31 |

Byrjað verður kl. 9.00 og endað verður kl. 16.00

formula XEROX

Pf. Formula Føroyar • Stiðjagøta 11 • FR-100 Tórshavn
Telefon 111 15 • Telefax 171 15


*Eftirlitið við Fiskavirking skeiv tíðindi:*

# Eginfígging uppá 20 mió.

Jan Muller

Eftirlitið við P/f Føroya Fiskavirking í gjaldsteðgi bar skeiv tíðindi, tá tað í fjølmiðlunum í vikuni upplýsti, at undir samráðingum við aðrar møguligar keyparar av virkjum hjá Føroya Fiskavirking, er blivið staðfest, at hesir keyparar í mesta lagi høvdu ein likviðan eginpening uppá 7-9 mió. kr.

Hetta siga Klaus Rasmussen, grannskoðari og Christian Andreasen, advokatur í tíðindaskrivi.

Teir siga, at við skrivi, dagfest 22. oktober 96 bjóðaðu teir vegna áhugaðar keyparar 48 mió. kr. kontant fyri virkini hjá P/f Føroya Fiskavirking. Av hesi upphædd vóru minst 20 mió. kr. kontantur eginpeningur, og tá varð ikki roknað møguligt innskot av eginpeningi frá Framtaksgrunninum.

Og teir siga víðari: „Veðhavararnir fráboðaðu okkum við skrivi, dagfest 28. oktober 1996, at tilboðið varð góðtikið, og ongar veruligar samráðingar spurdust burturúr hesum tilboði. Umframt eina eginfígging uppá minst 20 mió. kr. var fíggingin aftanfyri tilboð okkara ein lánitilsøgn frá Føroya Sjóvátrygging uppá 15 mió. kr. og frá Føroya Sparikassa uppá 20 mió. kr. Tað undrar okkum, hvaðani eftirlitið við P/f Føroya Fiskavirking í gjaldssteðgi hevði sínar upplýsingar, tí tilboð okkara frá 22. oktober 1996 varð eisini sent eftirlitinum til kunnleika" siga Klaus Rasmussen og Christian Andreasen.


**ROKKJALLARIN**

Vit átaka okkum at selja fyri fólk.

Eisini keypa vit deyðsbúgv.

**Rokkjallarin · Tlf. 11990 & 83390**

**Tinghúsvegur 42 · 100 Tórshavn**

Opið: mánad.–friggjad. 13–17.30
leygard.: eftir avtalu

**BILLUTIR**

útvegast til FLEST ALLAR BILAR

**Fa. BILLUTIR**

Tlf. 21605 Fax. 21666

HIN FØROYSKI NORRØNI EFTIRSKÚLIN

Påkærvej 3 · Hygum
7620 Lemvig
Tlf. 0 97 83 61 00
Fax 0 97 83 60 56